**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Tórshavn 27. september 2019

# Innbjóðing til skeið í WinGrodan 26. oktober 2019

Svimjisamband Føroya bjóðar við hesum til skeið í stevnuforritinum WinGrodan, at vera í ÍSF-høllini í húsinum hjá Ítróttasambandi Føroya, leygardagin hin 26. oktober 2019 frá kl 11 til 17.

## Málbólkur

Øll ið ynskja at kenna til og duga grundleggjandi brúk av Grodan forritunum. WinGrodan Stevnuforrit, Grodan Statistik, Grodan Anmeld.

Undirvíst verður á føroyskum.

## Endamál

At geva luttakarunum grundleggjandi vitan, so at teir kenna kenna mannagongdir fyri skráseting í Grodan-Statistik, tilmelding við Grodan Anmeld og grundleggjandi brúk av stevnu forritinum WinGrodan.

## Fortreytir

Fortreytir fyri luttøku er telduførleiki á byrjanarstøði til teldur við Windows stýriskipan.

Neyðugt er at hava við egna teldu, ið hevur Grodan forritini hjá Felagnum installerað, ella privata teldu og atgongd til brúkaraloyvi hjá felagnum. (Feløg ið hava brúkaraloyvi til WinGrodan, kunnu hava forritini installerað á fleiri teldum.) Best er at hava hvør sína teldu, men møguleiki er eisini at 2 eru saman um eina teldu.

Forritini kunnu bert koyra á Windows teldum.

## Innihald

Kunning um installatión av Wingrodan og vegleiðing um brúkaraloyvi.

Grodan - Statistik

- Stovnan av svimjarum, skráseting av tíðum hjá svimjarum og liðum
- Innlesing av úrslitafílum frá WinGrodan (RE fílin og Lef. fílin)

ATLANTIC AIRWAYS

Grodan – Anmeld

- Innlesing av innbjóðingarfílu (GR fílin og Lef. fílin)
- Tilmelda svimjarar: Tilmelda svimjara úr dátugrunni, Tilmelda svimjara manuelt.
- Gera kvalifikatiónslista

Win Grodan – Stevnuforrit

- Stevnufyrireiking: Gera kappingarfílu (Innbjóðing), FINAstig, Met, lesa inn tilmeldingar og gera startlista
- Á svimjustevnuni: Riðlabýti, Tíðtaking og Úrslit
- Eftir svimjistevnuna: Úrslitalistar at senda til feløgini og SSF

Luttakararnir verða bidnir um at hava sína egnu teldu við, sum má koyra Windows við tað at WinGrodan ikki finst til Mac og líknandi.

Luttakararnir verða hartil bidnir um at hava sína útgávu av WinGrodan við, ella at skaffa sær neyðuga loyniorð hjá sínum felag til at kunna taka hana niður av netinum.

## Gjald og uppihald

Skeiðið er ókeypis, men felagið fær bót á kr 500 ífall at tilmeldaði luttakarin ikki møtir ella meldar avboð seinni enn hósdagin hin 23. oktober 2019 kl 16:00.

Har verður okkurt til matnað.

## Við svimjikvøðu

Starvsnevndin